


# Sosialurin rullar við trimum bilum

**Seinastu 6-7 árini hevur Sosialurin lagt seg eftir at náa fleiri tíðindum kring landið við teirri sokallaðu »rullandi redaktiónini«. Hendan skipan hevur hepnast so væl, at blaðið nú hevur tveir bilar og ein buss til endamálið**

SOSIALURIN 80 ÁR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Upprunaliga var ætlanin við rullandi redaktiónini at senda fólk kring landið at heinta tíðindi, fyri síðani at koma til hús aftur at skriva.

Við nýggja redaktiónsbussinum, sum blaðið nevnir »Snoddi«, er ætlanin at verða enn meira aktuell,

Hetta konseptið er nú útbygt – og hevur blaðið innrættað bussin til endamálið. Bussurin skal koyra kring alt landið – og er hann innrættaður við eini skrivstovu, so blaðfólk og myndafólk okkara heit og fjálg kunnu sita í bussinum og skriva, gera samrøður o. s. fr. Við beinleiðis intersambandi í bussinum ber til hjá myndamonnum og blaðfólki at senda tilfarið beinleiðis til Sosialin, so tíðindi fáast í blaðið beinanvegin, og soleiðis at til ber at dagføra heimasíðuna hjá Sosialinum og Portalin beinleiðis úr bilinum.

Tað var William Heinesen, sum segði, at Havnin er heimsins nalvi. Og nú Sosialurin hevur húsast í gomlu handilshúsunum hjá Williami og ætt hansara í Vágsbotni í út við tvey ár, kunnu vit sjálvandi eisini taka orð hansara til okkara, tí vit eru sera fegin um, at tað bar okkum til at flyta blaðhúsið heim í Vágsbotn, tá handilin hjá Valdemar Lützen lat aftur í 2004.

Hóast føroysku fjølmiðlarnir kanska hava ilt við at skilja, at tað er ein verð uttan fyri Havnina, so hava vit á Sosialinum ásannað tað. Júst hetta var orsøkin til, at blaðið stovnaði "rullandi redaktión".

Nú landfast er úr Gásadali til Viðareiðis er tað so upplagt, at vit eru meira úti um okkum á meginøkinum allatíðina. Vit fara sjálvandi eisini at vitja sunnanfjørðs, har góðu umstøðurnar í Toyota Hi-Ace bussinum geva okkara fólkum allar møguleikar at verða fyrst við tí síðsta.

Samstundis sum bussurin »Snoddi« verður at síggja kring alt landið, fara teir lítlu bilarnir, »Stavnur« og »Snar« fyri tað mesta at vera sjónligur í meginøkinum.

## Blaðstjórar á Sosialinum 1927-2007

Síðani Sosialurin kom út á fyrsta sinni í 1927 hava blaðstjórarnir verið hesir:

1. *Mourentius Viðstein*
2. *Petur Mohr Dam*
3. *Martin Joensen*
4. *J. H. Danbjørg*
5. *Poul Karbech Mouritsen*
6. *Villi Sørensen*
7. *Jákup Lindenskov*
8. *Torfinn Smith*
9. *Vilhelm Johannesen*
10. *Kristian Dahl*
11. *Jan Müller, fyritaksstjóri og ábyrgdarblaðstjóri og*
12. *Eirikur Lindenskov, blaðstjóri*

Sum fyritøkan vaks, gjørdist neyðugt at býta sundur starvið sum blaðstjóri og fyritaksstjóri.

Tískil varð Krisjan Dahl, sáli, sum doyði í bestu árum í 1998, settur sum fyritaksstjóri í 1983. Eitt skifti var Krisjan Dahl eisini politiskur blaðstjóri.

Eftir at Kristian Dahl doyði, gjørdist Jan Müller fyritaksstjóri og ábrygdarblaðstjóri, meðan Eirikur Lindenskov varð settur sum blaðstjóri.

Umframt blaðstjórarnar, hava eisini William Heinesen og Heðin Brú verið deildarblaðstjórar.




Í samband við at Frank Antoniussen, býarverkfrøðingur, fer frá aftaná 34 ár í starvið, verður móttøka á býráðsskrivstovuni 31. mai 2007 millum kl. 14.00 – 17.00

Vágs Býráð

Vágs kommuna
Vágsvegur 22 • 900 Vágur
tlf 37 30 24 • vagur@vagur.fo